HB-VB 0-0:

Tomgongd í Gundadali

Í einum fyri tað mesta linligum dysti, snávaði HB í dystinum móti VB, sum við javnleikinum blásti gullstríðið víðopið aftur

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Seinastu vikurnar er favorittleikluturin hjá HB vorðin alt meira sjónskur. Frá nógvum síðum hevur verið ført fram, at liðið hevði beina kós ímóti næsta FM-heitinum á rað, og í so máta skuldi kósin haldast við einum sigri, nú VB kom á vitjan.

Hendan ætlanin varð tó av ongum. VB sýndi frá fyrsta minutti í dystinum sunnudagin, at teir vóru komnir eftir eina stiginum. Við denti á ein væl skipaðan verjupart, royndu teir fyri tað mesta at standa rætt afturi á vøllinum, og so kanska eisini at dúva upp á onkran kontramøguleika, um hesin skuldi koma.

At HB soleiðis fekk tríggjar fjórðingar av vøllinum fyri seg sjálvt, hevði fyrst og fremst tvær avleiðingar. Fyri VB var tann fyrra av meira vandamikla slagnum, tí í nógvum førum datt liðið ov langt aftur á vøllin fyrstu løtuna, soleiðis at HB'arar at kalla ótarnaðir komu fram í skotstøður. Støður, sum tó einki málið kastaðu av sær, takkað verið Bjarna Johansen. Hin avleðingin – og hon var vandamikil fyri HB – var at heimaliðið als ikki varð trýst at seta ferð á spælið fyri at sleppa runt á vøllinum. Tí kom stórur partur av fyrra hálvleiki at ganga fyri seg í slow-motion, og tí eydnaðist tað ongan tíð vertunum at lata verjuna hjá gestunum upp.

Vánaligar verjur

Var talan um fáar møguleikar fyri steðgin, so broyttist hetta tó seinastu trý korterini. Ikki endiliga tí spælið á vøllinum batnaði so øgiliga nógv, men heldur tí verjurnar á liðunum báðum eisini høvdu hug at seta ferðina eins nógv niður.

Fyrstu løtuna eftir steðgin høvdu bæði Milan Culic og ikki minst Palli Augustinussen heilt góðar møguleikar at leggja VB framum, men hetta eydnaðist ikki, og so var tað HB, sum átti møguleikarnar. Tann størsta av hesum fekk Rógvi Jacobsen ivaleyst, tá hann noyddi Bjarna Johansen í eina stórbjarging, men yvirhøvur lág HB væl framvið. Tað nærmasta teir komu var tó eitt væl skotið fríspark frá Andrew av Fløtum, sum tó tók skeivu megin stólpan.

Ikki fyrr enn seinastu tíggju minuttirnar ella so gjørdist talan um veruligt trýst frá HB. Vágbingarnir tóktust nú heldur ikki at orka meira, og við tað at bólturin støðugt varð sparkaður niðan, var tað at kalla altíð ein reyð/svørt troyggja, sum tók ímóti, soleiðis at nýtt álop kundi byrja. Hetta gjørdist tó ongan tíð nóg mikið. Fleiri ferðir vórðu bóltar sendir inn í brotsteigin, og oftani var trunkuspæl í og kring brotsteigin, men tær fáu ferðirnar, at møguleikar spurdust burturúr, átti vágbingar ein tryggan aftasta skansa í Bjarna Johansen.

Tað eydnaðist vágbingum at halda fast um annað stigið í Gundadali, og fyri HB mundi hetta koma illa við, nú endaspurturin er farin ígongd

Mynd: Álvur Haraldsen

Sum vera man, so vóru tað vágbingarnir, sum vóru fegnastir um úrslitið, tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð. Teir høvdu fingið tað, sum teir komu eftir, og ikki minst mundi gleðin eisini vera so sjónlig, tí liðið hesaferð hevði havt teir smáu marginalarnar við sær, heldur enn ímóti, sum tað so ofta hevur verið í ár.

Hjá HB var støðan heldur øðrvísi. Við javnleikinum loyvdu teir í øllum førum B68, B36 og kanska NSÍ við aftur í FM-stríðið, har HB fram til sunnudagin hevði so nógv tey bestu kortini á hondini. Enn er tað eisini HB, sum liggur best fyri í hesum, men trýstið frá kappingarneytunum er nú munandi størri. Eftir landsliðssteðgin, sum nú kemur, skal oddaliðið nú vitja á Mølini, har tað sjáldan er lætt at spæla, og so koma dystirnir, sum alt meira tykjast skula avgera gullstríðið í ár. Fyrst B68 og síðani B36, áðrenn KÍ kemur á vitjan seinasta umfarið. Avgjørt ikki lættir dystir, men fyrimunurin er so, at teir allir eru í Gundadali. So er spurningurin bara, um avrikið verður hvassari til ta tíð, enn tað var sunnudagin.

Dysturin í tølum

HB-VB 0-0
Dómari: Petur Skarðenni. Lat í nógvum førum ov nógv óftantaligt spæl ganga, uttan at hetta varð revsað.
HB: Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Rúni Nolsøe, Martin Christensen, Hallur Danielsen – Tór-Ingar Akselsen, Rógvi Jacobsen, Andrew av Fløtum
VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Nikolic – Mortan í Hørg, Anders Sørensen, Milan Kulic, Dan Djurhuus, Palli Augustinussen – Brian Andresen, Birgir Jørgensen

Arbeiðsformaður søkist

Runavíkar Kommuna sóknast eftir
Arbeiðsformanni til veg- og kloakkdeildina.

Arbeiðsformaðurin: kemur í høvuðsheitum, undir leiðslu av teknisku deild, at standa fyri umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiðinum í samband við vegir og kloakkir o.a í Runavíkar Kommunu.

Lønarviðurskifti: sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Persónligir eginleikar: umsøkjarin, sum skal vera í góðum árum, skal hava handverkara útbúgving og/ella royndir í samband við veg- og kloakkarbeiði, kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka skjótar og rættar avgerðir, vera fyrikomandi og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jógvan D. Jakobsen, býarverkfrøðing, á telefon 417000.

Umsókn: saman við viðmælum og neyðugum upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. september 2003.
Viðmerkjast skal á brævbjálvan "Arbeiðsformaður".

Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26 • FO 600 Saltangará • Tel 417 000 • Fax 417 001 • runavik@runavik.fo • www.runavik.fo

KÍ-B36 1-2 (0-1):

Altjóða spælararnir vóru munurin

Klaksvíkingar vóru fyri tað nógva omaná, men tað var B36, sum fekk flestu málini og harvið stigini

Enn eina ferð sótu klaksvíkingar eftir við ráka av, at teir høvdu søplað alt burtur á heimavølli ímóti havnarmonnum

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Eftir fleiri eyðmýkjandi tap ímóti B36 fyrr í ár vóru klaksvíkingar uppsettir uppá, at tað hesa ferð skuldi eydnast at vinna. Tapið varð í gásareygum bara 2–1 hesa ferð,men tað var sjálvandi nóg mikið til at kennast sum stórt vónbrot.

Stóri munurin á liðunum var í avgerandi royndunum ímóti málinum. Framrættaðu landsliðsmenninir hjá B36 tóku av, tá ið møguleikin var har. Ella rættari sagt syrgdu John Petersen og Jákup á Borg sjálvir fyri at skapa sær møguleikarnar, sum bóru mál og harvið sigurin og tey trý týdningarmiklu stigini við sær.

John Petersen, sum mannaði álopið saman við Heðini á Lakjuni, setti hol á, tá ið fyrra umfarið var um at vera hálvrunnið. Tróndur Vatnhamar sparkaði langt út, Heðin á Lakjuni spældi Jákup á Borg, ið hevði leiklut sum framrættaður sentralur miðvallari ella kanska afturryktur miðframherji. Jákup spældi við hælinum upp á tvørs til John Petersen, sum sneiddi seg leysan av verjuni og smekkaði upp undir nettakið.

Málið var vátur vøttur hjá heimaliðnum, sum hevði havt bóltin nógv, og sum í løtum vísti gott samanspæl. Atli Danielsen var væl upplagdur sentralur miðvallari, men tað eydnaðist honum ikki at fáa mál, tá ið hann hevði møguleikarnar. Hann smekkaði í 1. hálvleiki langskot í stólpan, Tróndur Vatnhamar stórbjargaði stútara frá Atla eftir horna, og í tí førinum, tá ið KÍ hevði besta møguleikan undan steðginum, gjørdi Atli í so skjótt av. Teir vóru tríggir klaksvíkingar ímóti einsamallum verjuspælara, tá ið einasti landsliðsmaðurin hjá KÍ smekkaði til úti frá. Aftaná dugdu bæði hann og hinir at síggja, at tað hevði verið størri møguleiki fyri úrtøku, um hann hevði runnið eitt sindur longri við bóltinum, og so spælt upp á tvørs til Eyðun Klakstein ella Hjalgrím Elttør, sum vóru í góðari støðu.

Trýstu og fingu einki

Eftir steðgin legði KÍ bragdliga fyri. Teir sendu nógvar bóltar í brotsteigin, og tað var fleiri ferðir nær við og næstan. At tað gekk so illa at fáa mál hevði við sær, at Jacob Bymar, sum framvegis eigur fyrsta málið í landskappingini til góða, síðani hann í summar kom úr Esbjerg og til KÍ, varð tikin út í 62. minutti. Í staðin varð Leon Bjartalíð, sum stóð seg væl, tá ið hann hóskvøldið á Svangaskarði varð settur inn á vongverjan, settur í álopið. Leon gjørdi skjótt av. Hann hevði bara verið ein minutt á vøllinum, tá ið hann hevði javnað. Eftir framlegging inn um verjuna miseydnaðist fyrsta royndin, men tá ið Tróndur Vatnhamar drálaði, fekk Leon nýggjan møguleika, og hóast skotið kendist eitt sindur kiksað, so fór bólturin í málið.

Lagið var gott á heimafólkinum, sum luktaði fyrsta sigurin á havnarmonnum í landskappingini í ár. Men tað kiksaði. Bólturin var ofta í B36 brotsteiginum. KÍ hevði nógv hornaspørk, men teir fingu einki mál, og so tørnaði tað út, sum tað ofta ger.

KÍ hevði bóltin mest, og tað var B36, sum fekk sigursmálið. Aftur hesa ferð var talan um landsliðsspælara, sum fekk mál burturúr ongum. Eftir B36 horna stútaði Ovi Nysted út frá, Eyðun Klakstein roynd at leingja, men Jákup á Borg fekk bóltin, snaraði um seg sjálvan og smekkaði av brotsteigarmarkinum og upp í málhornið. Eitt sera vakurt mál, sum klaksvíkingar ikki megnaðu at gera honum eftir, hóast teir høvdu størri møguleikar enn henda, og so fór B36 við øllum.

– Vit høvdu aðrar møguleikar at gera mál. John Petersen og Heðin á Lakjuni vóru eina ferð einsamallir í málteiginum, og Heðin var eina aðra ferðina púra blankur, uttan at tað eydnaðist at fáa bóltin inn um Kartin Joensen, sigur Jákup á Borg, sum sjálvandi er ovurfegin um, at tað hetta vikuskiftið lagaði seg soleiðis, at B36 kom við aftur í FM stríðið.

– Vit mugu vinna okkara dystir, og so mugu vit vóna, at úrslitini fara at laga seg okkum til fyrimunar. Í kvøld fari eg til Runavíkar at vita, um EB/Streymur fer at megna at gera nakað við NSÍ, segði Jákup á Borg fyrrapartin í gjár. Hann og hinir í B36 hava tvær ferðir fyrr í ár kent sviðan av, hvat EB/Streymur megnar.

Dysturin í tølum

KÍ–B36 1–2 (0–1)
0–1: John Petersen 20.
1–1 Leon Bjartalíð 63.
1–2: Jákup á Borg 78.
Dómari: Suni Johansen
KÍ: Kartin Joensen – Jan Andreasen, Ovi Nysted, Aleksander Djordjevic, Símun Joensen – Arnold Joensen, Atli Danielsen, Allan Joensen, Eyðun Klakstein (Harley Bertholdsen, 87.) – Jacob Bymar (Leon Bjartalíð, 62.), Hjalgrím Elttør
Gult kort: Ovi Nysted, Allan Joensen
B36: Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Rúni Elttør, Kenneth Jacobsen – Niels Joensen (Fróði Clementsen, 80.), Klæmint Matras, Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen – John Petersen (Tórolvur Poulsen, 85.), Heðin á Lakjuni
Gult kort: Jákup á Borg

MAERSK AIR
It's got to be perfect